# Heimagjørdu páskareggini klár

**Aftur í ár hevur Peturbjørg Poulsen fylt ein handil á tremur við heimagjørdum páskareggum í alskyns litum, støddum og sniðum.**

PÁSKIR
Rigmor Dam
rigmor@sosialurin.fo

Í ár hevur Peturbjørg leigað seg inn í hølini, sum eru næst frisør Sax & Føn uppi við ljóskurvarnar á Jóannesar Patursonar gøtu í Havn. Hetta er aðru ferð at Peturbjørg sjálv selur heimgjørd páskaregg, fyrr plagdi hon at selja tey í kiosk Activ.

Peturbjørg sigur, at hon bílegði sjokolátuna til eggini úr Belgia beint undan jólum og at hon síðani hevur stoypt skeljarnar síðani nýggjár. Fyri eini tveimum vikum síðani fór hon undir at fylla og pynta skerljarnar, og balla tær inn í litfagurt silvurpappír og í sellofan. Og nú er handilin fyltur frá gólv til loft við prýddum páskareggum, páskapynti, krukkum, kurvum og skálum við konfekt og góðgæti.

Og Peturbjørg greiðir frá, at sum nakað nýtt, ber nú eisini til fáa eitt egg fylt eftir egnum ynski í handlinum, og hon vísir á íløtini og skálirnar, sum er á tremur við belgiskari konfekt, smáum litføgrum páskareggum og karamellum.

– Tey flestu vilja hava egg við ljósari sjokolátu, og tey miðalstóru fyri einar 150 krónur selja best, sigur Peturbjørg, sum bæði selur egg til tann forelskaða mannin, til ommubarnið og til fyritøkuna, sum vil forkela starvsfólkini. Fyri ikki at gloyma risaeggið, sum stendur aftanfyri diskin og kostar 1600 krónur. Og tað er selt!

– Í hesum egginum eru hálvsfjórða kilo av sjokolátu, og tað er fylt við øllum sløgunum av góðgæti, sum vit selja, sigur Peturbjørg, sum eisini heldur, at munur er á, um eggið er til børn ella vaksin. Sostatt eru eggini til børn ofta fylt við gummibommum, lakres og karamellum, meðan teimum tilkomnu líkar best, at eggini eru fylt við konfekt, marsjipan og tílíkum.

Spurd, um hon kann liva av at selja heimagjørd páskaregg, sigur hon, at tað loysir seg als ikki. Av tí, at hon ger alt sjálv, hevði hon eiheldur kunna liva upp til eftirspurningin, um so var, at allar Føroyar skuldu havt heimagjørd páskaregg. Tó selur hon til nøkur støð í Føroyum, eitt nú til Klaksvíkar.







*Páskareggini við ljósari sjokolátu selja best. Peturbjørg hevur innflutt sjokulátuna úr Belgia.*

Endiliga:

# Ungdómscafé í Havn

**Nú sleppur havnarungdómurin á café, sum tey ungu sjálvi standa fyri og reka**

UNGDÓMSKAFÉ
Rigmor Dam
rigmor@sosialurin.fo

Í nógv ár hevði ungdómurin í Havn ongastaðni at fara í vikuskiftunum. Av tí, at tey ikki sluppu inn á skonkistøðini og á caféirnar, hava tey í mangan gingið og reikað í gøtunum, til tey eru vorðin somikið beinfryst, at einasta gongda leiðin hevur verið heim í song. Men nú verður hetta søga.

### Ung starvsfólk

Nýggjasta tiltakið hjá kommununi er ein ungdómskafé í boheme-umhvørvinum í Tórsgøtu, har mentanin í býnum frammanundan blómar. Kaféin verður opin hvørt fríggja- og leygarkvøld millum 19 og 01, og verða tað ung fólk millum 15 og 17 ár, sum koma at reka og mynda staðið. Higartil hevur kommunan sett sjey ung í starv, og verða tey somikið væl lønt, at tað ber til at krevja nakað av teimum.

### Ungt hugskot

Hugskotið til kaféina birtist, tá ungdómsráðstevna á Háskúlanum var í heyst. Har var eitt nú ein bólkur, sum viðgjørdi ungdómspolitisk mál, og var ein av niðurstøðunum hjá bólkinum soljóðandi: Vit ynskja okkum eina kula kafé, har babyrokkarar ikki sleppa inn. Har vit kunnu hanga út, skipa fyri temakvøldum, jamsessions og dansi í vikuskiftinum...!

Og kommunan gjørdi ikki mætari, enn at taka tey ungu á orðið, lýsa eftir ungum starvsfólkum, seta tey í starv og so annars at fáa tey í sving.

### Ung ábyrgd

Bogi Andreassen, leiðari fyri Margarinfabrikkina kemur at stuðla teimum ungu í at fáa staðið upp at standa, og hann leggur stóran dent á, at hetta verður eitt tilboð til tey ungu úr 14 ár, og at tað vera tey ungu sjálvi, sum seta dagskránna á staðnum. Tey koma at skipa fyri tiltøkum, at hava vaktir og at hava ábyrgdina av samskiftinum við miðlarnar. Tó fara tey altíð at kunna keypa sær professionella ráðgeving, eitt nú frá Jákup Weihe og øðrum, greiðir Bogi Andreassen frá. Og hann sigur víðari, at tað verða trý ung til arbeiðis hvørt kvøld í vikuskftinum, umframt ein vaksin, sum altíð hevur evstu ábyrgdina.

– Higartil hava tey lagt til rættis og keypt inn til kaféina, og eg má viðganga, at eg kenni ikki helmingina av heitunum: Espresso, Café au Lait, Ice Chocolat, Cappuccino, peanuts, nachos og salsa… og so framvegis. Maskinur, innbúgv, koppar og annað. Tað ljóðar ordiliga lekkurt, sigur Bogi Andreassen, sum samstundis sigur, at hetta ikki er ein typisk pedagogisk verkætlan, men at endamálið við kaféini er at geva teimum ungu í Havn betur umstøður at hanga út í – men undir skipaðum umstøðum.

Spurdur um hetta ikki er kappingaravlagandi, svarar Bogi avgjørdur:
Nei, tí hesin málbólkurin er ikki vælkomin nakra aðrastaðni.



*Tey sjey starvsfólkini á ungdómscaféini. Frá vinstri: Alis, (varaleiðari í Margarinfabrikkini), Døgg, Bára, Turid, Bogi (leiðari í Margarinfabrikkini), Fríði, Tjóðhild og Karl Jóhan. Margretha situr við rygginum til.*